# Tað sum sonurin hjá grannanum sá...

**Tað er kanska deiligt at vera tannáringur, sum kann brúka tíðina til at spæla telduspøl, surfa á alnótini, eta junk food og síggja sjónvarp. Í Filminum Disturbia kann tannáringurin Kale hugna sær heima, men mest av øllum, tí hann er dømdur at sita heima**




**Leikandi:**

| | |
|---|---|
| Kale | Shia LaBeouf |
| Mr. Turner | David Morse |
| Ashley | Sarah Roemer |
| Julie | Carrie-Anne Moss |
| Ronnie | Aaron Yoo |
| Leikstjóri | D.J. Caruso |

**Framførdur í Havnar Bio frá 24. august**
**105 minuttir**

## Ummæli



**Kim Simonsen**
kimsimonsen@hotmail.com

Hann livir við einari fótleinkju. Hann hevur mist pápan, og eftir eina ferðsluvanlukku gjørdist Kale sera óður og fór at gera ónáðir. Hann hevur nú ein dóm fyri harðskap hangandi yvur høvdið. Mamman hevur ikki longur ráð til, at Kale ger alt, sum hann vil, so eftir er bert at hyggja út gjøgnum vindeygað.

Hann fer undir at eygleiða grannarnar, og skjótt sær hann, at alt er ikki, sum tað eigur. Hann fær illgruna um, at ein av grannunum er drápsmaður. Við eitt gerst "suburbia" til "disturbia" og Kale.

Eitt tað besta við at hyggja eftir grannunum er grannagentan Ashley. Vinurin hjá Kale og Ashley fara undir at kanna ein av grannunum, Mr. Turner. Tað er hann, tey halda vera drápsmann.

### Fólk sum eygleiða

Filmsøgan er stúgvandi full av slíkum filmum, har onkur eygleiðir ein annan gjøgnum vindeygað. Nakrir av teimum bestu er Antonionisa Blow Up, Michael Powellsa

Peeping Tom, Hitchcocksa Rear Window, Coppolasa The Conversation og aðrir. Hesin filmurin er so ein um modernaðar talgyltar "YouTube" og MySpace" tannáringar.

Disturbia er ikki ein serliga góður filmur, søgan er alt ov tunn. Onkunsvegna er hann tó verdur at síggja.

---

**Notes on a Scandal** er ein thrillari um tvær kvinnur, leiktar av tvær av teimum bestu kvinnuligu leikarunum í heiminum í dag, Judi Dench og Cate Blanchett. Ein er ung og vøkur, hin er eldri og býr einsamøll. Tær gerast vinkonur, men hetta dugir Barbara (Judi Dench) ikki at umsita. Tá yngra kvinnan hevur eina afferu, fer Barbara meiri og meiri at stýra lívinum hjá yngru kvinnuni Sheba. Ein sera góður filmur.




**A Good Year** er ein kærleikakomedia við Russel Crowe. Hann er ein beinharður bankamaður, sum við eitt arvar ein romantiskan víngarð í Frankaríki, har hann er uppvaksin. Hann fer at ivast í sínum virðum, og tá hann møtir kærleikanum í rustikka Provence hendir ein broyting. Crowe riggar ikki í leiklutinum sum Don Juan. Ridley Scott hevur gjørt ein av sínum ringastu filmum.




**Solo** er ein dokumentarfilmur um danska popstarsangaran Jon. Hann var sera "hot" eina stutta tíð, men nú eru fólk farin at hata hann. Hann var "in", nú er hann "out". Hann er blaðungur og longu ein "has been". Solo er deiliga provokerandi og harður filmur, um hendan Jon, sum bara er endaður sum ein tragedia.




**Alt om min buske** er ein yvirdrivin og superløgin filmur. Nils og Karin eru ung flyta inn í eini hús. Grannarnir eru tvær eksentriskar systrar, har hin eina er samkynt. Filmur er nærum surrealistiskur, men alt í alt er hann alt annað enn væl eydnaður.






**The Kovak Box** er ein b-filmur. Hann er okkurt slag av sf-filmi, men er bara so ótrúliga b-filmasligur, at hann ikki kann takast í álvara.